# Íslendska liðkappingin
## – ein frásøgn eftir Helga Dam Ziska

Fyri knøppum tveimum mánaðum síðani var eg eitt rend yviri í Ìslandi og telvaði fýra umfør í íslendsku liðkappingini fyri liðið Talvfelagið Reykjavík (TR). Íslendska liðkappingin verður hildin yvir tvey vikuskifti, eitt í oktober og eitt í mars; fyrra vikuskiftið verða telvað fýra talv og seinna vikuskiftið trý. Fíggjarvinarliga skipanin ger, at tað loysir seg lutfalsliga væl hjá liðunum at styrkja seg við útlendskum telvarum, og tað er ein møguleiki, sum flestu teirra gagnnýta. Í so máta er ikki løgið, at íslendska liðkappingin er nógv tann sterkasta í Norðurlondum. Millum telvararnar, sum vóru í Íslandi vikuskifti 7. til 9. oktober, vóru m.a. nøvn sum Loek Van Wely, Yuri Kuzubov, Mikhail Gurevich, Gawain Jones. Áhugavert var eisini at síggja nærum allar íslendsku stórmeistararnar til dystin fús.

Talvfelagið hjá mær, TR, hevði undan kappingarbyrjan m.a. útvegað sær stórfingin nøvn sum Polgar, Kamsky, Gashimov, Sutovksy og sjálvan Karpov til styrkilistan, men tað stóð sjálvandi greitt, at tað skuldi nógv til at fáa nakran av hesum at taka lut. Tað ljóðaði, at Anatoly Evgenevich, sum kom til Íslands í øðrum ørindum, fór at telva við nøkur av umførunum, men tá ið tað kom til stykkis, valdi hann at avmarka seg til eitt snartalv ímóti Friðrik Olafsson og nøkur fjøltalv kring landið. Eitt skot fyri bógvin hjá okkum, sum høvdu droymt um at telva undir liðini á fyrrverandi heimsmeistaranum, men vit fingu um ikki annað høvið at heilsa uppá.

Nakað óvæntað varð eg settur at telva á 2. borði á liðnum (aftanfyri GM Papin). Undan fyrsta talvinum ivaðist eg í, um hetta kanska var ein ov stór avbjóðing, men tíanbetur vóru liðini, vit møttu, ikki millum tey ovastu á styrkilistanum, so mótstøðan gjørdist kortini sera hóskandi. Eftir tey fyrstu fýra umførini av kappingini kundu bæði eg og liðið fegnast um eitt væleydnað vikuskifti. Liðið lá á einum stak nøktandi øðrumplássi, aftanfyri Bolungarvík, sum okkurt av umførunum hevði átta stórmeistarar á liðnum(!), og sjálvur hevði eg fingið til høldar 3 stig av 4 møguligum. Eg vann tvey talv og leikti tvey jøvn, m.a. ímóti stórmeistaranum og navnanum, Helga Olafsson. Samlaða úrslitið førdi við sær eina ratingframgongd á 7 stig, og tað var eg sjálvandi væl nøgdur við. Besta talvið var frá 2. umfari, tá eg telvaði við svarta fólkinum í móti danska altjóða meistaranum Nikolaj Mikkelsen:

## Mikkelsen,Nikolaj (2384) - Ziska,Helgi Dam (2460)

Íslendska liðkappingin (2), 07.10.2011
*[Helgi Dam Ziska]*

**1.e4 c5 2.Nf3 d6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 Nf6 5.Nc3 a6** Najdorffrábrigdið í Sisilionskum.

**6.Bg5**



Mest álopssinnaði leikurin í støðuni.

**6...Nbd7** 6...e6 er vanligi leikurin, og eftir 7.f4 Ribd7 8.Ff3 Fc7 koma vit tá út í sjálvan Najdorf-høvuðsvariantin, sum í nógvum førum er analyseraður langt út í leik 30. Tað kann tykjast sum, at lítil munur er á 6...e6 og 6...Ribd7, tí báðir leikirnir eru partur av vanligu uppstillingini hjá svørtum, men so er ikki. Báðir leikirnir hava fyrimunir og vansar; fyrimunurin við 6...Ribd7 er, at svartur varðveitir møguleikan at leika ...e7-e5.

**7.Qe2**



Hvítur roynir at taka stingin úr ...e5 við at lata f-finnuna standa. Hetta gevur meining, tí høvuðsætlanin við einum møguligum ...e5 er at býta e-finnuna upp við f-finnuna hjá hvítum og harvið vinna d7-riddaranum ein útpost á e5.

Um svartur nú skiftir taktikk og stillar seg upp við ...e6, ...Fc7, ...Be7, ...b5 o.s.fr., leikar hvítur f4, 0-0-0, g4 (g3) og Bg2, og vit fáa eina vanliga støðu við frúnni á e2. Ivanchuk nýtti henda leikhátt at húðfleingja Van Wely í Wijk aan Zee fyri smáum tveimum árum síðani. [Um hvítur fylgir vanligu ætlanini við 7.f4 Qc7 8.Qf3 , fær svartur høvið at nýta áðurnevnda møguleikan við 8...h6 9.Bh4 e5!?]

**7...e5!?** Kortini. Hesin leikurin kann tykjast anti-positionellur, tí svartur bæði viknar um d5-puntin og loyvir hvíta riddaranum fram á f5, men hesir vansar verða javnaðir út av tí, at hvíta frúgvin nú kemur at standa til ampa á e2 og helst má flyta aftur, fyri at bispurin á f1 skal sleppa út.

**8.Nf5** Sjálvandi. Hvítur fer eftir d5-puntinum. **8...h6**



**9.Bxf6** Tríggjar vikur seinni valdi týski unglingin Berchenbreiter annan leikhátt: 9.Bh4. Tá endaði við javnleiki eftir spennandi vápnagný: 9...g6 10.Ne3 Be7 11.0–0–0 b5 12.Bxf6 Nxf6 13.Ned5 Be6 14.g3 Rc8 15.Kb1 0–0 16.h4 Kg7 17.Bh3 Rc5 18.Nxf6 Bxf6 19.h5 Bc4 20.Qd2 Qa5 21.b3 Be6 22.Bxe6 fxe6 23.hxg6 Bg5 24.Qxd6 Qxc3 25.Qd7+ Kf6 26.Rd6 Qxc2+ 27.Ka1 Qc3+ 28.Kb1 Qc2+Berchtenbreiter,M (2290)-Ziska,H (2460)/Bayern-chI Bank Hofmann 15th 2011 (9)/½-½

**9...Nxf6 10.Ne3** Mótstøðumaðurin flutti leikin eftir stutta umhugsunartíð, men hetta er longu ein óneyvleiki. Svartur ætlar ikki at taka á f5 kortini, so hví flyta riddaran longu? Eg tók hetta sum eina ábending um, at danin var ókunnigur við støðuna. [10.0–0–0 er betri: eftir 10...g6 11.Ne3 Be6 er støðan nøkunlunda jøvn.]

**10...Be6**




**11.g3** Hvítur ger greitt, at hann ætlar at hava strangt eftirlit við d5-puntinum. Men eg var fegin um at síggja henda leikin, tí eg visti, at g3 ikki er millum fimm teir sterkastu leikirnar sambært telduni ☺ Uppstillingin við Bg2 tóktist mær heldur ikki at vera í tráð við spælistílin hjá dananum, og eg gitti, at hann valdi leikin mest fyri at sleppa undan at flyta frúnna umaftur. [Eg hevði væntað 11.0–0–0 , men møguliga var mótstøðumaðurin bangin fyri at koma undir álop eftir ...Rc8 og ...Fa5.]

**11...Rc8 12.Bg2 Qb6**




**13.0–0!** Hetta hevði eg yvirsæð. Eg hevði vónað at sleppa út í 13.0–0–0 Rxc3 14.bxc3 Bxa2 við góðum álopsmøguleikum. Svartur hevur ikki fingið eins nógv fólk í spæl, men hinvegin er hvíta fólkið rættiliga óvirkið - serliga synd er í bispinum á g2.

**13...Be7!** Svartur letur seg ikki í freistingar. [13...Qxb2?! 14.Ncd5 gevur hvítum hættisligt initiativ. Til dømis: 14...Bxd5 15.exd5 Qc3 16.Rab1 Qc7 17.f4 Be7 18.fxe5 dxe5 19.Nf5 við ætlanini d6.]

**14.Kh1?!** Byrjanin upp á eina skeiva ætlan. **14...0–0**



[14...Qxb2 var eisini gjørligt her, við ætlanini 15.Ncd5 Bxd5 16.exd5 Rc7 við fyrimuni til svartan]

**15.f4?** Tað var tíð upp á verja b2; nú missur hvítur eina finnu fyri einki. **15...exf4** Eg helt hetta vera tað einfaldasta. **16.gxf4 Qxb2 17.Ncd5 Bxd5 18.exd5**



Hvítur hevur einki fyri finnuna. **18...Rfe8** [18...Rc7 var heldur ikki heilt av leið.] **19.Rab1 Qxa2 20.Rxb7 Bf8** Við hóttanini ...Rc3. **21.Qd3 Qa5** Aftur við somu hóttan. **22.Rb3 Rc7!**



Ein góður leikur: svartur ger klárt at dobbla á e-linjuni og syrgir samstundis fyri, at rókurin ikki kemur undir álop eftir eitt møguligt Fxa6. [Eg sat eina løtu og royndi at fáa 22...Qc5 at rigga, men uttan úrslit. Trupulleikin er, at c8-rókurin er óvardur eftir 23.Qxa6 Rxe3 24.Rxe3 Qxe3 25.Qxc8]

**23.Rg1** Eitt greitt tekin um, at hvítum væntar eina skilagóða ætlan. **23...Qa4!**



Ein leikur, sum eg var sera væl nøgdur við undir talvinum. Hvítur er nú noyddur at flyta rókin yvir aftur á f1.

**24.Rbb1?** Tvørligheit. Hvítur ger tað klassiska mistak, at hann ikki vil viðganga mistakið og flyta rókin aftur, haðani hann kom. [Tankin handan ...Fa4 var, at 24.c4? tapir orsakað av 24...Rxe3! 25.Qxe3 Ng4 26.Qg3 Qxb3! 27.Qxg4 Qxc4–+; 24.f5?! er eiheldur ein leikur, ein gleðiliga ger.]

**24...Qxf4 25.Rb3 Rce7 26.Qf5 Qh4 27.Nf1 Re5**



Nú helt eg, at hann gott kundi gevast. **28.Qf3** Men nei; danin treiskast. **28...Ne4 29.h3 Be7** [Her var 29...g6 við ætlanini ...Rf5 ella ...Rxd5 helst lættari.]

**30.Ra3** Um hetta mundið var eg blivin eitt sindur argur yvir, at eg ikki fann nakran forseraðan gevinst. Eg hevði brúkt nógva tíð seinastu leikirnar fyri at finna lættasta mátan at vinna uppá, men avleiðingin var, at eg nú var komin í tíðarneyð. Her høvdu vit báðir um fýra minuttir eftir til leik 40.

**30...Nf2+!**



Byrjanin upp á eina fiksa kombinatión, sum eg tíverri ikki tordi at fullføra.

**31.Kh2 Bg5 32.Ng3 Ne4?!** Panikkur. [Upprunaliga ætlanin hjá mær var at leika 32...Re3! 33.Rxe3 Rxe3 34.Qxf2 Rxg3 vid ætlanini ...Bf4, men so sá eg 35.Rf1! Bf6 36.Qxg3? Be5 37.Qxe5 dxe5, og henda støðan tóktist mær í og so tvíeggjað vid frífinnuni á d5. Men her sigur Fritz -5,20, so tad skuldi sjálvandi verið lætt vunnið. Varianturin, sum eg var bangin fyri, var 38.Rd1 Kf8 39.d6 Ke8 40.Bc6+ Kd8 41.Rb1, men her kann svartur bara leika 41...Kc8! vid vinnandi fyrimuni.]

**33.Rf1 Qxg3+ 34.Qxg3 Nxg3 35.Kxg3**



Svarta støðan er sjálvandi vunnin, men við ólíkalittum bispum skal ein ávísur neyvleiki til.

**35...Re2 36.Rxa6 Bf6?** Ætlanin er at fáa bispin upp á e5, men hetta gevur hvítum óneyðugar møguleikar. [36...Bh4+! vinnur einfalt: 37.Kh2 Rxc2 38.Kh1 Bg3–+]

**37.Rxf6!** Sjálvandi. Hetta er einasti møguleiki. **37...gxf6 38.Rxd6 R8e3+ 39.Bf3 Rxc2 40.Rxf6 Kg7 41.Rf4 Rd2**



So er tíð til eina eftirmeting av støðuni. Svartur hevur rók fyri bisp, men orsakað av avmarkaða materialinum hevur hvítur ávísar remismøguleikar. Hvíta kongastøðan og spjaddu finnurnar gera tað tó trupult at verja støðuna. Eg minnist, at eg var ikki sørt argur inn á meg sjálvan, at eg hevði loyvt hvítum út í hetta endatalvið og ikki megnað at gjørt av við hann fyrr. Men so hugsaði eg við mær sjálvum, at Kramnik heilt víst hevði vunnið hetta endatalvið í móti hvørjum tað skuldi verið. Soleiðis kom eg ásamt við mær sjálvum um, at støðan enn var vunnin, og tað var ein stórur lætti.

**42.Rg4+ Kf6 43.Rf4+ Ke7 44.Kh4** Hetta sær ivasamt út. [44.Kg4 er meira áhaldið.]

**44...Rdd3 45.Bg2** Eitt tekin um, at hvítur hevur mist tamarhaldið. **45...Rg3**



**46.Rf2?** Avgerandi mistakið. [Men tað er longu trupult at geva ráð – til dømis 46.Bf1 Rdf3 47.Rxf3 Rxf3 48.Bg2 Rf5, og hesa støðuna hevði Kramnik í øllum førum vunnið!]

**46...Rg5!** Hvíti kongurin er endaður í einum mátnetið. **47.Be4?** Ger ilt verri. **47...Rd4 48.d6+**



**48...Kd8** [Endiliga ikki 48...Kxd6?? 49.Rf6+ Ke5 50.Re6+! Kf4 51.Rf6+ o.s.fr.]

**49.Rf4 f5 50.d7 Rb4** Og mótstøðumaðurin legði kongin. Ein nydelig endastøða!

**0–1**